

## Mikladalsnevndin haft fund

Fyrsti fundurin varð í vikuni í sokallaðu Mikladalsnevndini. Lagið var gott á nevndarlimunum til fyrsta fundin hjá Staðbundnu nevndini fyri Mikladal, eisini nevnd Mikladalsnevndin. Til býráðsvalið 11. november 2008 høvdu mikladalsbúgvar tveir valseðlar. Ein til Klaksvíkar býráð og ein til Mikladalsnevndina. Trý umboð av Mikladali hava umboðan í Mikladalsnevndini, og tvey umboð eru frá Klaksvíkar býráði. Í nevndini sita: Gunvá við Keldu, borgarstjóri, ið er forkvinna í nevndini Hans Arni Bertholdsen, umboð fyri minnilutan í Klaksvíkar býráði, Markus Suni í Norðnastovu, Joen Hendrik Hendriksen, Jógvan Andrias Sørensen.

# Manningin á Sundabergi ikki uppsøgd



*Nú Sundaberg kemur heim við 760 tonsum av flaki, er hýrurin umborð ikki bestur. Hanus Hansen, reiðari, sigur tó í morgun, at einki nýtt er um møguliga sølu av skipinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Verksmiðjutrolarin Sundaberg verður á Klaksvík í nátt, og Skálaberg fer at sigla um eina viku ella 10 dagar. Reiðarin, Hanus Hansen, váttar yvirfyri Sosialinum í morgun, at einki nýtt er at frætta um møguliga sølu av Sundabergi, og manningin er ikki uppsøgd**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Vanligt er, at menn gleða seg til at koma heim, og tað gera teir 38 menninir eisini umborð á Sundabergi. Skipið kemur á Klaksvík í nátt við 760 tonsum av flaki. Tó skilst á monnum, sum eru við skipinum, at hýrurin er ikki betri enn góður.

Seinastu tíðina hevur nevniliga verið graml um, at Sundaberg kanska verður seldur, og áhugaðir keyparar hava eisini verið umborð, tá skipið hevur verið inni í Noregi.

Hanus Hansen, reiðari, hevur áður sagt, at skipið í øllum førum ikki verður selt nú.

Í stuttari samrøðu við Sosialin í morgun sigur reiðarin, at eingin avtala er gjørd um sølu av skipinum, og at manningin ikki er søgd úr starvi.

- Tað er einki nýtt í tí málinum, leggur hann aftrat.

### Skálaberg at sigla

Hanus Hansen veit at siga, at Skálaberg, ið hevur umleið somu nøgd av flaki sum Sundaberg, væntandi fer at sigla um eina viku ella 10 dagar.

Bæði skipini fóru úr Føroyum 3. januar í ár.

- Tá Skálaberg kemur heimaftur og hevur lagt veiðina upp, fara teir á kongafiskaveiði, leggur reiðarin aftrat.

Sum skilst, er ikki greitt, hvat Sundaberg, sum er liðugur við sína kvotu í norskum sjógvi, nú fer at gera.

### Spældu puss

Bæði Sundaberg og Skálaberg byrjaðu hendan túrin í norskum sjógvi, men tá stýgur kom í samráðingarnar millum Føroyar og Noreg um býtið av eyka makrelkvotuni norðanfyri, vórðu føroysku verksmiðjutrolararnir riknir úr norskum sjógvi og fóru í gráu leiðina at royna.

Tá so trætan landanna millum umsíðir loysnaði við tað, at Føroyar lótu norðmonnum allan makrelin, teir vildu hava, fóru skipini aftur í norskan sjógv at royna.

Fiskiskapurin hjá føroysku verksmiðjutrolarunum í gráu leiðini gjørdist góður, sum tíðin leið, og tá avtalan við norðmenn kom upp á pláss, høvdu skipini rokfiskiskap.

Skipari á Sundabergi er Brandur Joensen úr Miðvági.

# Eik Banki aðalfund í Norðurlandahúsinum

EIK BANKI
*Vilmund@sosialurin.fo*

Seinnapartin í dag hevur Eik Banki aðalfund í Norðurlandahúsinum, har nevndin fer at leggja fram sína frágreiðing um virki hjá bankanum í farna ári.

Á skránni verður eisini framløga av grannskoðaðari ársfrásøgn til góðkenningar.

Onnur mál, sum eru á skránni til aðalfundin í dag, eru 1) Avgerð um nýtslu av yvirskoti ella rindan av halli sambært góðkendu ársfrásøgnini og 2) Uppskot um at heimila nevndini at lata bankan ogna sær egin partabrøv í tíðini fram til næsta ársaðalfund.

Eftir at hesi mál hava verið til viðgerðar og støðutakan, verður val av nevndarlimum og grannskoðara.

Fjølmiðlar hava atgongd til aðalfundin, og Eik Banki hevur eisini bjóðað okkum á Sosialinum/ Rás2 at senda tvey umboð á aðalfundin, sum byrjar klokkan 17 í dag.

Sosialurin royndi at fáa orð Bjarna Olsen, stjóra í Eik Banka, til aðalfundin í dag, men stjórin var ikki tøkur beint fyri døgurða.

Hin 27. februar í ár – dagin fyri eykaaðalfundin í bankanum – kunngjørdi Eik ársúrslitið fyri farna ár, sum vísti eitt hall upp á 314 miljónir krónur.

Í viðmerkingum til úrslitið, segði bankin, at tað serliga er altjóða rákið, sum hevur sett síni spor í ársroknskapin, og soleiðis eisini týðandi virksemi hjá bankanum uttanlands.

- Men inntøkurnar í Eiksamtakinum eru øktar, og grundleggjandi bankaraksturin vísir eitt avlop á 392 miljónir krónur. Samtakið hevur gott gjaldføri, og solvensurin er 10,6 prosent, segði Eik Banki, tá ársroknskapurin varð almannakunngjørdur við endan av februar.

